

www.oljan.fo

**Jan Müller** 16 - 03 - 2013

# Hvassar atfinningar móti Shell í Arktis

Valla hevði Shell steðgað sínum virksemi í tí arktiska økinum í ár, so stendur felagið aftur fyri skotum. Hesaferð eru tað teir amerikonsku myndugleikarnir, sum leggja felagið undir at hava sett tað viðkvæma umhvørvið í Arktis í váða. Ein frágreiðing hjá amerikanska innanríkisráðnum skjalprógvar, at tað vóru álvarssamir trupulleikar við trygdini á Shell-boripallinum Kulluk, sum fór á land í Alaska í januar eftir at hava rikið fyri váð og vind. Shell viðgekk í februar, at felagið var ikki til reiðar at fullføra tær ætlaðu boringarnar, og at felagið tí hevði gjørt av at hava ein steðg í Arktis í ár. Amerikanska frágreiðingin, sum US Departement of Interior almannakunngjørdi fyrradagin, er ræittiliga hvassorðað og vísir á ávísar álvarssamar trupulleikar við trygdini við Kulluk, og at talan var um viðurskifti, sum áttu at vera í lagi. Ein ávaring Jon Burgwald hjá umhvørvisverndarfelagsskapinum Greenpeace er skelkaður av innihaldinum í teirri amerikonsku frágreiðingini. Hann sigur, at frágreiðingin prógvar, at Shell helt fram við verkætlanini, hóast felagið visti, at tað hevði ikki fylgt trygdarkrøvunum. -Shell hevði ta bestu tøknina og allar førleikar, men gjørdi kortini eitt stórt mistak. Hetta eigur at vera ein ávaring til øll tey arktisku londini - eisini Danmark og Grønland - um, at oljufeløgini eiga ikki at sleppa til Arktis. Annars er tað bara ein spurningur um tíð, til vanlukkan hendir, sigur Jon Burgwald við KNR. ? ?